Sirið Stenberg
Høgni Hoydal
Bjørt Samuelsen
Kristina Háfoss
Beinta Løwe
Hervør Pálsdóttir

Løgtingsmál nr. /2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum landslæknaembæti, eftirlit við heilsustarvsfólkum og stovnum á heilsuøkinum, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, líkskoðan, vevnaðarflutningur, euforiserandi evni, sjúklingarættindi og eftirgjørdur gitnaður)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum

(Yvirtøka av málsøkjunum landslæknaembæti, eftirlit við heilsustarvsfólkum og stovnum á heilsuøkinum, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, líkskoðan, vevnaðarflutningur, euforiserandi evni, sjúklingarættindi og eftirgjørdur gitnaður)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum broytt við løgtingslóg nr. 105 frá 12. desember 2006, løgtingslóg nr. 62 frá 7. juni 2007, løgtingslóg nr. 93 frá 22. oktober 2007, løgtingslóg nr. 35 frá 19. mai 2008, løgtingslóg nr. 53 frá 7. juni 2008, løgtingslóg nr. 54 frá 7. juni 2009, løgtingslóg nr. 53 frá 11. mai 2009, løgtingslóg nr. 54 frá 11. mai 2009, løgtingslóg nr. 7 frá 17. februar 2010, løgtingslóg nr. 55 frá 26. mai 2011, løgtingslóg nr. 69 frá 29. mai 2017 og løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018, verður § 1, stk. 2, nr. 7 orðað soleiðis: "7) heilsuverkstænastur, løggilding av og kærur um heilsustarvsfólk, ótilætlaðar hendingar og gransking á heilsuøkinum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi ólavsøkudag í 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Við løgtingsmálinum "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøku av málsøkjunum landslæknaembæti, eftirlit við heilsustarvsfólki og stovnum á heilsuøkinum, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, sjúklingarættindi, líkskoðan (herundir líksýn og obduktión), vevnaðarflutning, euforiserandi evni og eftirgjørdan gitnað)", verða hesi málsøki yvirtikin. Hetta soleiðis, at føroyskir myndugleikar, sbrt. lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, fáa lóggávuvaldið og útinnandi valdið á omanfyrinevndu málsøkjum.

Tann parturin av autorisatiónslógini, ið snýr seg um autorisatiónir og autorisatiónsskráseting, verður ikki yvirtikin, men verður framhaldandi undir ábyrgd hjá donskum myndugleikum. Hetta økið er regulerað í: "anordning nr. 1472 frá 16. desember 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed". I løtuni er tað Styrelsen for Patientsikkerhed, sum umsitur løggilding av heilsustarvsfólki og autorisatiónsskránna. Men vísir tað seg undir viðgerðini , at tað er trupult at sundurskilja autorisatión og eftirlit, so eiga vit at meta um, um vit ikki eisini eiga at yvirtaka autorisatiónslógina og gera samstarvsavtalu um hetta, so vit í fyrsta umfari kunnu keypa okkum tænastuna.
Málsøkið "klagur- og endurgjaldsmøguleikar innan heilsuverkið" verður heldur ikki yvirtikið í hesum umfarinum. Hetta økið er regulerað í: "anordning nr. 1248 frá 19. desember 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang indenfor sundhedsvæsenet. Málsøkið "ótilætlaðar hendingar", sum er regulerað í kap. 61 í Sundhedsloven, verður heldur ikki yvirtikið í hesum umfari. Harumframt verður málsøkið "gransking á heilsuøkinum" framhaldandi felagsmál. Hetta økið er regulerað í "anordning nr. 961 af 15. juli 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter".

Orsøkin til at vit ynskja at yvirtaka er, at vit meta, at tørvur er á at fáa ein sterkan fakmyndugleika innan heilsuøkið í Føroyum, ið kann ráðgeva landsstýrinum, kommununum og almennum myndugleikum í heilsuspurningum. Neyðugt er eisini at skipa ein fólkaheilsumyndugleika, sum skal vera føroyski fakmyndugleikin á heilsuøkinum. Møguliga kunnu m.a. Fólkaheilsuráðið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og landslæknin v.fl. húsast í fólkaheilsumyndugleikanum. Landslæknin skal, undir føroyskum málsræði, hava til uppgávu at veita holla ráðgeving til landsstýrið, kommunur og almennar myndugleikar í heilsufakligum spurningum. Harumframt skal landslæknin fremja eftirlit við stovnum á heilsuøkinum og eftirlit við heilsustarvsfólki.

Við "landslæknaembæti" er í hesum lógaruppskoti at skilja tær ráðgevandi uppgávur, ið landslæknin hevur fyri føroysku myndugleikarnar og tað eftirlitið, ið landslæknin hevur við stovnum innan heilsuøkið og við heilsustarvsfólki.

Yvirtøkan av landslæknaembætinum fevnir um yvirtøku av ráðgevandi partinum av landslæknauppgávuni, sum í dag er reguleraður í §§ 212 og 212a í Sundhedsloven. Í dag er tað Sundhedsstyrelsen og Styrelsen for Patientsikkerhed, sum hava hesa uppgávu. Harumframt verður eftirlitið við stovnum á heilsuøkinum og eftirlitið við heilsustarvsfólki heimtikið. Hetta verður í dag regulerað í ávikavist §§ 213-220 í Sundhedsloven og í pørtum av kap. 3 í autorisatiónslógini. Í dag er tað Styrelsen for Patientsikkerhed, ið hevur hesa uppgávu. Tað vil siga, at hesar ásetingar í kongligu fyriskipanunum um ígildissetan fyri Føroyar av Sundhedsloven og Autorisationsloven verða

yvirtiknar til føroyskt málsræði í hesum umfari. Áðrenn Sundhedsloven kom í gildi fyri Føroyar, vórðu omanfyristandandi viðurskifti regulerað í "anordning nr. 633 af 20. juli 1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v.", við seinni broytingum og "anordning nr. 634 af 20. juli 1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse", við seinni broytingum.

Umrøtt hevur verið bert at yvirtaka organisatoriska partin av eftirlitinum, men av tí, at organisatoriska eftirlitið og eftirlitið við einstøkum heilsustarvsfólkum hongur neyvt saman, mælir Styrelsen for Patientsikkerhed til, at bæði økini verða yvirtikin samstundis. Hetta var, tá ið arbeitt varð við málinum í 2018.

Hugsanin er, at ein samstarvsavtala verður gjørd við donsku myndugleikarnar, soleiðis at avbjóðingar í mun til grásonur í mun til uppgávur hjá landslæknanum og uppgávur hjá Styrelsen for Patientsikkerhed kunnu fáast av vegnum.

Mett verður, at uppgávurnar, ið liggja í "lov om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme og andre overførbare sygdomme", "lov om euforiserende stoffer", "lov om tvang i psykiatrien" og ásetingarnar í Sundhedsloven um sjúklingarættindi, líksýn og obduktión, hanga neyvt saman við tí arbeiði, sum landslæknin fremur í Føroyum. Mett verður tí, at tað er skilagott at yvirtaka hesar lóggávur, samstundis sum landslæknaembætið verður yvirtikið. Á hesum økjum er eisini neyðugt at gera samstarvsavtalu við danskar myndugleikar um, hvussu grásonu uppgávur á hesum økjum verða loystar frameftir.

Samstarvsavtala eigur at vera gjørd í samstarvi við Sundhedsministeriet og Styrelsen for Patientsikkerhed, og skal eftir ætlan vera klár til undirskrivingar áðrenn yvirtøkudagin.

Harumframt er ætlanin at yvirtaka ávísar aðrar uppgávur, sum landslæknin hevur í dag, so sum ábyrgd av hagfrøðiligum uppgávum viðvíkjandi heilivági, heilsulýsing landslæknans og ferðslu-medisinskar uppgávur, sum landslæknin í dag loysir fyri Akstovuna v.fl.

Tá ið málsøkið er yvirtikið, stendur verandi lóggáva á økinum við, sbrt. § 5 í yvirtøkulógini, jbr. § 13 í heimastýrislógini við teirri broyting sbr. § 2 í ræðislógini, at har heimildir ella skyldur liggja hjá donskum myndugleikum, verða tær við uppskotinum fluttar til avvarðandi føroyskar myndugleikar.

1.2. Galdandi lóggáva

Í løtuni er lóggávan á málsøkinum "landslæknaembæti" felags málsøki. Økið er regulerað í pørtum av "anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven", pørtum av "anordning nr. 1472 frá 16. desember 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed, sum broytt við anordning nr. 994 frá 2. juli 2018", "anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme", "bekendtgørelse nr. 1349 af 23. november 2015 af anordning for Færøerne om euforiserende stoffer", "anordning nr. 185 af 13. marts 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien, sum broytt við anordning nr. 385 frá 11. apríl 2012" "anordning nr. 633 af 20. juli 1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v.". Við hesum lógaruppskoti verður málsøkið yvirtikið.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka omanfyrinevndu partar av heilsumálsøkinum sum í høvuðsheitum fevnir um landslæknaembæti, eftirlit, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, líkskoðan (herundir líksýn og obduktión), vevnaðarflutning, sjúklingarættindi, euforiserandi evni og eftirgjørdan gitnað.

Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar, sambært lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, lóggávuvaldið og útinnandi valdið á nevnda málsøki.

Málsøkið, sum yvirtikið verður, fevnir í dag um tær lógir v.m., ið eru nevndar í fylgiskjali 1.

Í sambandi við yvirtøkuna skulu møguliga gerast nakrar tillagingar av myndugleikabýtinum á heilsumálsøkinum orsakað av teimum heimildum, sum føroysku myndugleikarnir fáa.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini (lóg nr. 79 frá 12. mai 2005) og sbr. § 13 í heimastýrislógini (Lov nr. 11 frá 31. mars 1948).

Í sambandi við yvirtøkuna av landslæknaembætinum verða starvsfólkaviðurskifti viðgjørd sambært lov nr. 528 frá 24. juni 2005 om visse personalemæssige spørgsmål i forbindelse med de færøske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder, og sambært løgtingslóg nr. 84 frá 14. mai 2005 um rættindi løntakaranna í sambandi við, at landsstýrið yvirtekur mál og málsøki frá ríkismyndugleikunum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við hesum lógaruppskoti verða málsøkini landslæknaembæti, eftirlit, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, líkskoðan (herundir líksýn og obduktión), vevnaðarflutningur, sjúklingarættindi og eftirgjørdur gitnaður formliga yvirtikin. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar lóggávuvald og útinnandi vald á nevndu málsøkjum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Landslæknaembætið hevur upplýst, at samlaðu útreiðslurnar til rakstur av embætinum í Føroyum eru mettar til 2.1 mió.kr. í 2018, herav 1.7 mió.kr. til lønir til landslæknan og onnur starvsfólk og 300.000 kr. til annan rakstur. Harumframt eru 100.000 kr. í húsaleigu, av teimum 42.000 kr. til olju og el; 50.000 kr. til smittandi sjúkur, rættarlæknaligt eftirlit v.m. Tá ið landslæknaembætið verður yvirtikið, yvirtaka vit ábyrgdina av rakstrinum av embætinum á 2.1 mió.kr.

Umframt hetta verður mett, at tað verður neyðugt at seta tveir løgfrøðingar í Heilsu- og innlendismálaráðnum til at taka sær av teimum lógum, sum vit yvirtaka og til at veita løgfrøðiliga ráðgeving til undirliggjandi stovnar á økinum. Eisini verður tað mett at verða neyðugt at seta ein løgfrøðing í nýggja fólkaheilsumyndugleikan til at tilevna vegleiðingar í mun til tær lógir, ið vit yvirtaka og veita løgfrøðiliga ráðgeving til landslæknan. Ein mett upphædd av hesum er 1.8 mió.kr.

Umframt hetta verður neyðugt at keypa ávísar uppgávur frá Styrelsen for Patientsikkerhed eftir eina yvirtøku av landslæknaembætinum. Væntandi verður upphæddin ikki hægri enn 1 mió.kr.

Bygningurin, sum landslæknin húsast í, er ogn hjá landsstýrinum.

Við heimild í §§ 213-220 í "anordning nr. 821 frá 22. juni 2018 um ikrafttræden for Færøerne af Sundhedsloven" verður nýggj skipan við eftirliti við stovnum á heilsuøkinum sett á stovn. Ætlanin er seta "bekendtgørelse om registrering af tilsyn med offentlige og private behandlingssteder" í gildi fyri Føroyar. Sambært hesi kunngerð skulu stovnarnir gjalda eitt árligt gjald fyri eftirlitið við stovnum á heilsuøkinum. Av tí, at ætlanin er, at eftirlitið við stovnum skal verða sjálvfíggjað, verður ikki mett, at útreiðslur fara at standast av at seta hetta eftirlit á stovn.

Tilsamans verða mettu útreiðslurnar av yvirtøkuni umleið 4.9 mió.kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tá ið landslæknaembætið verður yvirtikið, kemur umsitingin hjá landslæknanum á føroyskar hendur. 1. september 2017 starvaðust trý starvsfólk á landslæknastovninum: landslæknin, ein skrivstovufulltrúi og ein skrivari. Harumframt eru tveir konsulentar tilknýttir, ið taka sær av rættarlæknaligum uppgávum. Eftir ætlan skal landslæknaembætið skipast undir fólkaheilsu-myndugleikanum, og tá ið hesin verður settur á stovn flyta starvsfólk landslæknans til fólkaheilsumyndugleikan.

Landslæknin hevur upplýst, at tað ikki kunnu væntast aðrar umsitingarligar avleiðingar av yvirtøkuni. Tó verður væntandi brúk fyri hjálp frá Styrelsen for Patientsikkerhed til tey eftirlit, ið skulu verða við stovnum á heilsuøkinum.

Umframt hetta verður tørvur á at seta tveir løgfrøðingar í Heilsu- og innlendismálaráðnum til at taka sær av lóggávuni á økinum og til at veita løgfrøðiliga ráðgeving til undirliggjandi stovnar á økinum. Eisini verður mett, at neyðugt verður at seta ein løgfrøðing í nýggja fólkaheilsumyndugleikanum til at tilevna vegleiðingar og veita løgfrøðiliga ráðgeving til landslæknan.

§ 29 í "anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af Sundhedsloven" inniheldur ásetingar um, sjálvsavgerðarrætt hjá sjúklingum í mun til lívfrøðiligt tilfar, og um hvussu sjúklingar kunnu skráseta sínar avgerðir í "Vævsanvendelsesregisteret". Sambært lógini er møguligt hjá føroyskum sjúklingum at skráseta seg í danska "Vævsanvendelsesregisteret". Ætlanin er, at samstarvsavtala verður gjørd við danir um, at føroyskir sjúklingar framhaldandi kunnu skráseta seg í danska "Vævsanvendelsesregisteret", inntil vit hava sett á stovn eina føroyska Vevnaðarskrá.

Sambært § 38, stk. 1 í "anordning nr. 185 af 13. marts 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien" við seinni broytingum, kunnu ávísar avgerðir hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini kærast til "Det Psykiatriske Ankenævn". Hetta eru m.a. avgerðir um tvingsils viðgerð, likamliga valdsnýtslu og latan av doyvandi evnum við valdi. Av tí, at talan er um heilt fá kærumál: 1 kæra hevur verið til hesa kærunevnd síðani 2009, verður ikki mett ráðiligt at stovna nýggja kærunevnd í Føroyum til hetta endamál. Ætlanin er, at samstarvsavtala verður gjørd við danir um, at kærur um avgerðir hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini framhaldandi skulu kunna kærast til "Det Psykiatriske Ankenævn" í Danmark. Av hesi orsøk verður ikki mett neyðugt at gera myndugleikaflytingar í mun til hesa áseting.

Sambært § 3 í "anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme" verður sett ein "Epidemikommission". Føroyskir myndugleikar manna hesa kommissión. Hesi eru: landslæknin, Landsdjóralæknin, leiðarin á Gjaldstovuni, leiðarin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, fútin, umframt trý umboð, sum landsstýrið tilnevnir. Av tí, at kommissiónin er sett av landsstýrinum og føroyskir myndugleikar longu sita í kommissióni, er ikki neyðugt at gera myndugleikaflytingar í mun til hesar ásetingar.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar umsitingarligar avleiðingar við sær, so sum avleiðingar fyri vinnuna, kommunur, umhvørvið, serstøk øki í landinum, avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, ella sosialar avleiðingar, av tí, at einasta broyting á økinum er, at myndugleikin nú gerst føroyskur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention". Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við hesi grein verður yvirtøkan formliga framd.

Við "landslæknaembæti" er í hesum lógaruppskoti at skilja tær ráðgevandi uppgávur, ið landslæknin hevur fyri føroysku myndugleikarnar og við eftirlitið, ið landslæknin hevur við stovnum innan heilsuøkið og við heilsustarvsfólki. Málsøkið verður í dag regulerað í §§ 212 og 212a í Sundhedsloven, í §§ 213-220 í Sundhedsloven og í pørtum av kapitli 3 í autorisatiónslógini.

Ásetingar um "Heilsustarvsfólk" finnast í dag í: "Anordning nr. 1472 frá 16.12.2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed" við seinni broytingum, "Anordning nr. 1248 om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang indenfor sundhedsvæsenet og "anordning nr. 1060 af 4.9.2017 af lov om psykologer" við seinni broyting.

Ásetingar um euforiserandi evni eru at finna í: "anordning nr. 1349 frá 23. november 2015 om euforiserende stoffer".

Ásetingar um "sjúkufyribyrging" eru at finna í: "anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme".

Ásetingar um "sjúklingarættindi" eru at finna í: "anordning nr. 827 af 30. september 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om patienters retsstilling".

Ásetingar um "gransking á heilsuøkinum" eru at finna í: "kongelig anordning nr. 961 af 15. juli 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter".

Ásetingar um "sinnissjúkraviðurskifti" eru at finna í: "kongelig anordning 185 af 13.03.2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien" við seinni broytingum.

Ásetingar um líkskoðan og vevnaðarflutning eru at finna í: "anordning nr. 268 af 20. april 2001 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ligsyn, obduktion og transplantation m.v.".

Galdandi lóggáva viðv. eftirgjørdum gitnaði í Danmark er: "lov om assisteret reproduktion i forbindelse med behandling, diagnostik og forskning". Galdandi lóggáva í Føroyum viðv. landslæknaembætinum er: §§ 212-220 og §§ 198-201 í "kongelig anordning om ikrafttræden for Færøerne af Sundhedsloven"

Til § 2
Gildiskomuáseting. Lógin fær gildi ólavsøkudag 2021. Hetta soleiðis, at tíð skal vera til føroyskar myndugleikar at fyrireika seg fyrisitingarliga til øll praktisk viðurskifti, áðrenn yvirtikið verður.

Á Løgtingi, 04. august 2020

Høgni Hoydal	Sirið Stenberg	Beinta Løwe Jacobsen
Hervør Pálsdóttir	Kristina Háfoss	Bjørt Samuelsen

Fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Lóggáva sum yvirtøkan fevnir um